**Kvívíkar skúli**

Kvívíkar skúli skal vera eitt gott arbeiðspláss hjá næmingum,lærarum og starvsfólkum.
Fyri at røkka hesum máli, eiga næmingar og lærarar skúlans at virka fyri, at øll kenna seg trygg, trívast og hava virðing hvør fyri øðrum.

**Atferðarreglur**

- ✓ Næmingarnir skulu møta rættstundis og væl fyrireikaðir til tímarnar
- ✓ Í tímunum skal vera arbeiðsfriður
- ✓ Kravt verður, at næmingarnir bera seg fólkaliga at – bæði mótvegis øðrum næmingum, lærarum og starvsfólkum skúlans
- ✓ Øll hava fyrilit hvør fyri øðrum, bæði á skúlaøkinum og uttanfyri hetta
- ✓ Kravt verður, at øll fara væl um skúlan, innbúgv, bøkur og tilfar

**Loyvt er ikki**:

- ✓ at arga, happa ella tosa niðrandi um onnur
- ✓ at fara av skúlaøkinum í skúlatíðini uttan loyvi
- ✓ at rópa og garta inni í skúlanum
- ✓ at roykja á skúlaøkinum
- ✓ at nýta súkklu, rennifjøl o.t. á skúlaøkinum
- ✓ at kasta kavabløk uttanfyri vøllin
- ✓ at hava fartelefon við í skúla
- ✓ at hava góðgæti við í skúla
- ✓ at hava við sær í skúla lutir, ið kunnu vera teimum sjálvum ella øðrum at meini t.d. knív, eld.

Verða hesar atferðarreglur ikki hildnar, verða neyðug stig tikin, so viðurskiftini koma aftur í rættlag ( víst verður til Uppskot til mannagongdir.....).

**Annað**

Skúlin væntar eisini, at foreldur/avvarandi gera sítt til:

- ✓ at næmingarnir koma í skúla væl fyrireikaðir, úthvíldir og hava etið morgunmat
- ✓ at næmingarnir kenna ábyrgd/virðing fyri skúlanum
- ✓ at skúlin verður positivt umrøddur
- ✓ og at foreldur/avvarandi taka á seg ábyrgd av skúlagongdini hjá barninum øll skúlaárini
- ✓ Skúlin væntar eisini, at foreldur/avvarandi seta seg í samband við skúlan um ivamál eru

Annars verður víst til "Rundskriv um arbeiðsnáðir og gott skil í fólkaskúlanum".